# Føroyskt oljufelag í arbeið

**Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni er komið fyri at verða. Men tað ætlar ikki at standa í stað. Niðurstøðan eftir arbeiðsfund í Havn nú um dagarnar er púra greið. Ætlanin er at tvífalda felagið soleiðis at tað innan stutta tíð kann keypa upp onnur feløg, fara inn í onnur loyvi ella keypa upp onnur aktiv. Ambitiónin ella málsetningurin er at gera felagið til ein týðandi "spælara" ella luttakara í oljuvinnuni í Vestureuropa**

OLJUARBEIÐI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tey bæði føroysku oljufeløgini Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni eru alt meira frammi í miðlunum, nú oljutilgongdin við Føroyar og á Atlantsmótinum sum heild gerst meira spennandi og áhugaverd. Feløgini eru rættiliga ymisk og hava ymsar strategiir at virka eftir. Men felags fyri tey er, at tey hava føroyskar íleggjarar umframt teir útlendsku, og at tey hava eyguni vend móti bæði føroyskum øki og umráðum aðrastaðni.

Atlants Kolvetni, sum hevur nøkur ár á baki og eigur stóran skara av føroyskum íleggjarum, hevði sín fyrsta stóra savnanandi arbeiðsfund í farnu viku. Tey 7 fólkini, sum arbeiða hjá felagnum í Havn og í London, hittust øll í Nólsoyar Pállstovu í Havn mikudagin, har tosað varð um komandi stóru avbjóðingarnar og um hvussu farast skal fram víðari.

Wilhelm Petersen, stjóri í felagnum sigur, at øll starvsfólkini hjá felagnum fyri fyrstu ferð vóru saman til nakrar samanhangandi arbeiðsdagar. Teirra millum vórðu eisini tey fólkini, sum vanliga arbeiða í London, har tey røkja aktivini hjá felagnum har. Tað er so ikki ein og hvør vit her tosa um. Talan er fyrst og fremst um Richard Hardmann, sum í mong ár stóð á odda fyri leiting í Europa hjá amerikanska oljufelagnum Amerada Hess men sum nakað herfyri fór frá vegna aldur. Síðani tá hevur hann verið






*Nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðinar men drívmegin er tann sama - eins og Nólsoyar Páll hyggja tey hjá Atlants Kolvetni frameftir - eftir nýggjum møguleikum.*

*Mynd Jens K. Vang*

partur av teaminum hjá Atlants Kolvetni og við sær hevur hann tikið onnur roynd fólk sum hann í síni tíð headhuntaði til Amerada Hess, eitt nú tær báðar kvinnurnar, Allison Harding, geolog og Lucy Slater, geofysikara. Uppgávan hjá teimum er at røkja loyvini hjá felagnum bæði í føroyskum og breskum øki. Men tey fylgja so eisini við, hvørji r aðrir møguleikar taka seg upp í Bretlandi.

Hesar fyrstu arbeiðsdagarnar í Havn við øllum serfrøðingunum hjá Atlants Kolvetni vóru mongu loyvini hjá felagnum og eisini nýggju uppgávurnar í bretskum øki viðgjørd. Felagið hevur keypt seg inn í fleiri loyvi á bretska landgrunninum við útbygging fyri eygað.

### Sunt grundarlag

Wilhelm Petersen sigur, at forrætningsgrundarlagið hjá Atlants Kolvetni er rættiliga gott og sunt, nú felagið hevur fingið nøkur rættiliga áhugaverd aktiv bæði á leiti- og útbyggingarsíðuni. Nú skulu avgerðir takast um at fara víðari og innan stutta tíð at tvífalda um felagið við antin at keypa upp onnur feløg, fara inn í onnur loyvi ella keypa upp onnur aktiv. Fleiri møguleikar eru og hesir vórðu allir á arbeiðsborðinum hjá felagnum í farnu viku. Ambitiónin ella málsetningurin er, sigur stjórin, at felagið verður ein týðandi spælari í Vestureuropa.

Á arbeiðsfundinum vórðu eisini viðgjørd tey bæði nýggju loyvini felagið fekk tillutað saman við Geysir í 2. útbjóðing á landgrunninum. Hesi eru strategiskt sera áhugaverd. Tey liggja sera tætt upp at loyvum hjá Statoil og ChevronTexaco, sum fara at bora brunnar har í næstu framtíð. So hesir brunnar kunnu lata upp fyri nógvum nýggjum upplýsingum um hetta nýggja leitiøkið á landgrunninum. Virksemi, sum verður í hesum økinum næsta ár, verður tí ótrúliga spennandi fyri okkum eisini leggur Wilhelm aftrat.

### Seismikk næsta ár

Atlants Kolvetni fer neyvan at skjóta seismikk í summ-